

# Fiskiveiðan kann ikki økjast

Leiðarin fyri fiskivinnustovnin undir ST (FAO) heldur ikki, at fiskiskapurin kring um heimshøvini kann økjast meira. - Heimsins íbúgvum tørva mat. Tí er tað ein týdningarmikil uppgáva hjá okkum at finna út av, hvussu nógv kann fiskast. Tonsatalið hevur í fleiri ár verið mett til 95 miljónir tons. Hetta tal kann ikki økjast, sigur Jorge Csirke, leiðari fyri FAO. Á fundi hevur hann greitt frá, hvussu fiskiveiðan hevur ment seg síðan seinna heimsbardaga. Í mong ár varð nógv meira fiskað í norðari hálvu enn á syðru. - Sum tíðin leið, øktist fiskiveiðan nógv á syðru hálvu, og nú hevur fiskiveiðan í Indiska Havinum, fram við strond Vesturafriku og í Suðurameriku yvirhalað veiðina á norðari hálvu. Eftir at veiðan sunnanfyri hevur verið fyri stórari øking, er vøksturin nú minkaður. Leiðarin fyri FAO sigur, at fiskastovnar eru kollapsaðir, og ikki minst hetta hevur ført til, at hugburðurin er broyttur. - Nú verður ikki í sama mun hugt at, hvussu nógv ber til at veiða, men meira, hvussu nógv er ráðiligt at veiða. Heimsins lond hava, sum árini eru liðin, fingið eyguni upp fyri, at fiskiríkidømið í heimshøvunum er avmarkað, og at nøkur fiskasløg mugu varðveitast sum føði til onnur fiskasløg. Ein liður í øllum hesum arbeiði, sigur Jorge Csirke, er tær altjóða avtalur, sum eru millum lond.

# øroyar

*Vit mugu hava eina breiða viftu við søgum, sum vit kunnu tippa tey um. Bíta tey ikki á eftir einum hálvum minutti, mugu vit freista tey við einari aðrari, og vóna at tey hekta seg á krókin – og ongantíð betur, um tey kenna á sær, at tey sjálvi hava funnið søguna"*

*Tórunn Ellingsgaard*



*Tey 16 tíðindafólkini hava arbeiðsmiðstøð í Miðlahúsinum, har høli, amboð og annað verður teimum frítt at ráða yvir. Her fundast Tórunn Ellingsgaard við blaðstjóran Jan Müller og Kára Mikkelsen, redaktiónsleiðara*

verður teimum frítt at ráða yvir.

Kunningarfundur fyri pressuni verður eisini í Miðlahúsinum, og skipar Samvit fyri tveimum felags útferðum, sum tey kunnu tekna seg til. Ein túrur verður vestur á Leitisvatn til Bøsdalafoss, og hin verður til Kirkjubøar.

## Einans føroysk myndafólk

Fyri at Bill Clinton og fylgi hansara skal ikki fáa ampa av pressuni, verða strangar reglur fyri, hvussu nógv, ella fá, kunnu verða við í fylginum. Sjónvarpið hjá Kringvarpinum hevur tvey upptøkulið við, og trý myndafólk frá Dimmalætting Sosialinum taka myndir. Tað verða sostatt føroysk myndafólk, sum fóðra allari heimspressuni við sjónvapsmyndum og prentmyndum av Clinton vitjanini í Føroyum.

- Til hetta hava vit upprættað eina heimasíðu við einum servara, har myndir og filmsbrot verða løgd út á sohvørt, sigur Tórunn Ellingsgaard, og hon greiðir frá, at avtalað er við sjónvarpið, at sokallaðir sjónvarpspakkar liggja klárir á kl. 16 og kl. 19 til altjóða fjølmiðlarnar at brúka.

Pressan, sum sleppur inn í salin í Norðurlandahúsinum, fær pláss uppi á balkongini.

– Tey kunnu bara taka notatir, og tað verður ikki loyvt at hava upptøkutól við inn, sigur Tórunn Ellingsgaard.

Ein sms'ur poppar inn á fartelefon Tórunnar. Onkur vil vita, um hon hevur fingið nýggjastu bókina hjá Bill Clinton: Giving, sum kom út á enskum fyri einum mánað síðani. Nei, hon er ikki komin til landið enn, sigur Tórunn, og tey avtala, at eitt av útlendsku tíðindafólkunum skal keypa eitt eintak upp við á flog-vøllinum í Skotlandi.

## Fyrireikaðir spurningar

Spurd, hvussu hon sjálv hevur fyrireikað seg til tiltakið, sigur Tórunn Ellingsgaard, at hon millum annað hevur lisið bøkurnar hjá Bill Clinton og Hans Blix. Saman við samstarvsfeløgum og Vinnuhúsinum hevur hon orðað nakrar spurningar til Clinton, tí teir skulu sendast fyrireikarunum til góðkenningar frammanundan. Hvat Clinton fer at tosa um, er ikki heilt greitt enn, tí tað er upp til hansara at tosa um tað, sum hann vil tann dagin. Men seinast tey vistu varð roknað við, at hann fer at tosa um globalisering, minkandi orkutilfeingið í heiminum, vandan fyri terrorismu, fátækradømi og broytingar í altjóða politisku myndini.

- Eg havi altíð hildið Clinton vera spennandi. Havi ikki lisið so nógv av honum fyrr, men havi altíð sett hann í bás stórar menn sum Gorbatjov og Mandela, sigur Tórunn Ellingsgaard, sum ikki hevur fyrireikað spurningar til Hans Blix, tí spurningar verða ikki settir honum.

## Síggja gott út

Eitt er at fyrireika seg fakliga til vitjanina. Annað er, at føroyska vertinnan sjálvandi eisini skal eisini síggja gott út, tá hon skal vera vertinna í Norðurlandahúsinum. Hvussu hevur Tórunn fyrireikað seg til hetta?

- Klæðini velji eg ikki sjálv. Sansir hevur ábyrgdina fyri øllum tí grafiska búnanum, harímillum eisini mínum klæðum, sigur Tórunn Ellingsgaard, sum tó lyftir lokið av einari hvítari skógvaeskju og avdúkar einar beigelittir leðurskógvar við høgum hælum. Og so hevur hon eisini tapt seg sjey kilo seinastu tíðina.

- Sum eg skilji á lagnum, so gongur myrkablátt aftur. Hárið fer ein frisør, sum eitur Elisabeth Maria Johannesen, at hava ábyrgdina av, meðan eg smyrji mær sjálv, sigur Tórunn Ellingsgaard, sum er eitt rættiliga kent andlit, ikki bara her hjá okkum, men aðrastaðni við. Millum annað sum sjónvarpsvertinna hjá MTV og morgunvertinna á donsku sjónvarpsrásini TV2. Tí er kanska heldur ikki løgið, at www.babeindex.dk er eitt tað fyrsta hittið, sum poppar upp, tá tú Googlar "torun ellingsgaard".

Um hon hevur hugsað um, hvønn týdning hendan stóra uppgávan kann fáa fyri karrieruna framyvir, sigur Tórunn Ellingsgaard seg als ikki hava hugsað um tað í hesum sambandi.

- Eg havi altíð verið rættiliga málrættað. Men seinastu árini eri eg vorðin alt meira tilvitað um, at seti eg mær eina deadline, so fokuseri eg upp á at røkka henni, sigur Tórunn Ellingsgaard.

Onkur plingar inn á Skype'in og ringitónin við kirkjuklokkum í fartelefonini rungar í rúminum, meðan oyrasniglurin ikki vil tað, sum eigarakonan vil. Viðhvørt er ikki lætt at vera tøk.

## Flytir ikki heim

Seinasta árið hevur Tórunn Ellingsgaard búð á San Torini saman við sjeikinum, sum er grikki og starvast innan ferðavinnuna har niðri. Síðani bókin um Janu kom út, hevur hon hugna sær har niðri, sum hon tekur til. Tí hevur hon heldur ikki arbeitt sum journalistur seinastu tvey árini.

- Men eg havi nógv hugskot, sum eg kundi hugsað mær at arbeitt við. Men nú skulu vit fyrst hava hetta frá hondini, og so fari eg niður aftur til San Torini at geara niður aftur.

Spurd, um hon kundi hugsað sær at flutt heim og tikið sjeikin við, flennir hon hjartaliga, meðan hon sigur, at tað kundi hon ongantíð funnið uppá.

- Nei, hann er grikki og vanur við hita. Og hann skilur slett ikki, tá eg spyrji hann í telefonini "and how is the weather today?" flennir Tórunn Ellingsgaard.



*San Torini, har Tórunn Ellingsgaard býr saman við grikska sjeikinum. 15.000 fólk búgva á oynni, og í teirra bygd búgva 1.500 fólk*

*Tíðindastreymurin rekur skjótt, og tíðindafólkini eru von at sálda søgurnar við harðari hond.*

*Tórunn Ellingsgaard*